# Holst fekk reytt kort

Sunnudagin spældi toppliðið í donsku 1. deild, Lyngby, á útivølli ímóti Herfølge. Eitt mál kom í dystinum, og tað fekk Lyngby. Anders Jochumsen skoraði tað tveir minuttir fyri hálvleikssteðgin. Í seinna hálvleiki var fyrrverandi føroyski landsliðsspælarin, Christian Lamhauge Holst, vístur av vøllinum, eftir at hann fekk sítt seinna gula kort í dystinum. Lyngby liggur fremst í næstbestu deildini, nú danska 1. deild fer í vetrarfrí.



# Holst var tann besti

Áskoðararnir hjá Lyngby hava valt Christian Lamhauge Holst til besta spælaran hjá liðnum í heyst. Í teimum 15 dystunum higartil hevur Holst gjørt vart við sær sum málskjútti og uppleggjari, og fjepparafelagið var als ikki í iva um, at hann skuldi veljast. Sambært heimasíðuni hjá Lyngby var talan um »en sikker valgsejr til den populære færing«. Hetta er triðju ferð, at Holst verður kosin besti spælarin í Lyngby í einari hálvari kapping, og tað er hann einasti spælarin hjá Lyngby nakrantíð, sum hevur klárað. Christian Lamhauge Holst hevur skotið 65 mál í 101 dystum fyri Lyngby.

H71-VÍF 23-27 (11-13):

# VÍF vann aftur

**VÍF vann sín næsta sigur á rað, tá teir vitjaðu í Hoyvík sunnudagin. Við sigrinum eru teir nú komnir uppá annað plássið. Hjá H71 kom ósigurin illa við. Teir liggja nú javnir við KÍF í stigum, og teir hava ikki vunnið síðani 1. umfar**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Toppur og botnur møttust í Hoyvík, tá H71 tók ímóti StÍF. Munurin á liðunum var bert tvey stig undan dystinum, men við sigri til VÍF er landskappingin farin í tvey. Trý lið hava lagt seg heilt fram í oddin, meðan trý lið liggja og róta í botninum.

### VÍF var omaná

H71 hevur verið eitt av yvirraskandi liðununum fyrstu umførini í ár. Ikki var væntað tað heilt stóra av teimum, men undan dystinum vóru teir heilt tætt við oddaliðini. Hjá VÍF hevur hinvegin gingið nakað sum vænta. Ligið lá undan unfarinum nummar trý beint í hølunum á báðum oddaliðunum.

Tað var eisini oddaliðið úr Vestmanna, sum byrjaði betur. Fyrstu løtuna leikaði annars javnt á, og eftir 15 minuttum stóð á jøvnum 6-6. Men so dróg VÍF veruliga frá, og næstu 10 minuttirnar vann VÍF 6-1, soleiðis at støðan nú var 7-12.

### H71 bardi seg aftur í dystin

Nú sá ikki alt ov gott út hjá H71. Við unga liðnum í huga var væl hugsandi, at H71 kundi fara niður við høvdinum, men so var ikki. Teir blivu við at kempa, og tá liðini fóru til hálvleiks vóru bert tvey mál á muni. Tá var støðan 11-13.

Í seinna hálvleiki byrjaði H71 sera væl, og eftir 7 minuttum høvdu teir kempa seg uppá javnleik. VÍF vísti tað, at rutinan hjá teimum er størri, og løtu seinni vóru aftur trý mál á muni. Men H71 vildi ikki geva seg yvir, og tá 20 minuttir vóru farnir av seinna hálvleiki javnaðu teir enn einaferð til støðuna 19-19.

### Sámal tók sakina í egnar hendur

Men eftir hetta høvdu vestmenningarnir fingið nokk. Fyrst legði Ingi Olsen VÍF við tveimum málum, tá hann skoraði tvey mál á rað, og so trein Sámal Joensen inn á pallin. Hann tók veruliga ábyrgd hjá gestunum, og við fimm málum á rað, meðan H71 bert fekk eitt, megnaði hann mest sum einsamallur at avgera dystin til fyrimuns fyri VÍF. Tá hann skoraði sítt fimta mál á rað til støðuna 21-26 við bert tveimum minuttum eftir á klokkuni, var greitt, at VÍF fór at vinna dystin. H71 megnaði tó at pynta nakað uppá úrslitið síðstu minuttirnar, og endaliga støðan gjørdist 23-27.

Við sigrinum hevur VÍF vunnið seg uppá annað plássið, bert eitt stig aftanfyri oddaliðið Neistan. Teir hava eisini vunnið tveir dystir á rað, so nú sær út til, at VÍF er komið veruliga í gongd. Hjá H71 sær minni gott út. Annan dystin á rað hava teir tapt í síðstu minuttunum, og tað tykist, sum ungu hoyvíkingarnir hava ilt við at fylgja við hinum liðunum síðstu minuttinar. Við ósigrinum vera teir verandi á fjórða plássið, men við KÍF er nú komið ájavnt H71 í stigum.



*VÍF tykist veruliga hava funnið stevið eftir tveir sigrar á rað. Sunnudagin gekk hetta út yvir H71, og nú blanda vestmenningar seg veruliga í oddastríðið.*

## Fakta um dystin

**H71-VÍF 23-27 (11-13)**

**Málskjúttar H71:** Niels Vggo Niclassen 7, Dánjal Tórgarð 4, Esbern Patursson 3, Janus Sørensen 3, Tróndur Vatnhamar 3, Poul Kjartan Dam 2, Gunnar Bláberg 1

**Málskjúttar VÍF:** Sámal Joensen 10, Ingi Olsen 7, Harald Bjørgvin 3, Agnar Joensen 3, Regin Joensen 2, Áki G. Olsen 1, Rói Lamhauge 1

**Brotskøst:** H71 3, VÍF 2

**Útvísingar:** H71 1, VÍF 6

## – Missa í endanum

Vit fingu orðið á Levi Nybo, málverja hjá H71, eftir dystin. Hann helt, at H71 misti møguleikan fyri stigi í endanum.

– Teir føra at kalla allan dystin, men í fleiri umførum megna vit at koma uppá javnleik. Men júst sum í dystinum ímóti Neistanum síðsta vikuskiftið, so missa vit alt á gólvið til síðst. Eg haldi, at verjan stendur væl stóran part av dystinum, men síðstu 10 minuttirnar megna vit ikki at steðga Sámal, og hetta kostar okkum møguleikan fyri stigi í dag. Eg vil tó leggja afturat, at vit hava eitt ungt lið, og VÍF vinnur heilt sikkurt uppá rutinuna í dag, sigur Levi at enda.

## – Høvdu tamarhald á støðuni

Regin Joensen hjá VÍF helt, at teir høvdu tamarhald á øllum dystinum, sjálvt um H71 í tveimum førum kemur uppá javnt.

– Sjálvt um vit helst gera tað óneyðuga spennandi, so haldi eg, at vit høvdu tamarhald á støðuni. Verjan er góð, og vit halda H71 niðri á bert 23 málum. Eg haldi tað vera gott, at vit nú megna at vinna dystirnar at enda. Hetta hava vit gjørt teir síðstu tveir dystirnar, og tað er eitt stórt fet rætta vegin. Til síðst sæst eisini týðiligt, at vit hava størri rutinu og størri breidd enn H71. Síðstu 10 minuttirnar gera vt allan munin í dag, og tað er eisini júst her vit vinna dystin, staðfestir Regin at enda.

VB-Stjørnan 25-18 (12-7):

# VB bukaði Stjørnuna

**Stjørnan tapti sín fyrsta dyst í ár, tá tær taptu stórt í Vági. Hjá VB kom sigurin væl við. Nú hava tær vunnið seg uppaftur á triðja plássið, og tær kunnu nú byrja at hyggja longur upp eftir stigatalvuni.**

HONDBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Í síðstu viku tóktist eingin kunna steðga Stjørnuni. Tað gekk tó bert ein vika, so hevði VB prógva, at Stjørnan heilt víst er at práta við. Tær megnaðu nevniliga at vinna stórsigur á oddaliðnum sunnudagin, og við hesum sigri eru kvinnurnar úr Vági nú væl á veg at blanda seg í oddastríðið.

### VB betru byrjanina

Sjálvt um Stjørnan var klárt oddalið undan dystinum, so vildi VB vísa, at tær eisini kunnu blanda seg í oddin, og tær løgdu eisini fyri sum eitt ódnarverður, tá Stjørnan var á vitjan sunnudagin. VB var nøgv betra liðið í fyrra hálvleiki, og tá liðini fóru til hálvleiks hevði VB lagt seg á odda heili 12-7.

### VB setti oddaliðið uppá pláss

Um nakar helt, at Stjørnan nokk skuldi vera betur við í seinna hálvleiki, so fóru tey skeiv. Tí VB ætlaði sær bestemt ikki at lova Stjørnuni inn í dystin. VB økti hinvegin støðugt um leiðsluna, og serliga ein leikari gjørdi um seg hjá VB. Ikki óvæntað var talan um Daivu Tuomeite, sum ferð aftaná ferð sendi bóltin í málið hjá Stjørnuni.

Tá tað nærkaðist endanum á dystinum var greitt hjá øllum inni í høllini, at her fór heimaliðið at draga longrsta stráðið, og at fyrsti ósigurin hjá meistarunum fór at gerast veruleiki. VB vann at enda dystin 25-18, og við hesum sigrinum hava tær vunnið seg uppaftur á triðja plássið, bert tvey stig frá oddaliðnum.

Við ósigrinum hevur Stjørnan nú tvey lið beint í hølunum á sær. Neistin er bert eitt stig aftanfyri, meðan VB er tvey stig aftanfyri Stjørnuna við sigrinum sunnudagin.